## Slógvið skal brúkast

Grønlendska fyritøkan Royal Greenland og ráðgevingarfelagið Carl Bro fara nú at kanna, hvussu grønlendski fiskiídnaðurin kann fáa meiri burtur úr tí, sum í dag frer til slógv og verður malið til mjøl. Talan er um høvd, ryggir og skræðu av fiski og rækjuskeljar. Endamálið er at kanna, um tað loysir seg fíggjarliga at gagnnýta ein størri part av tí, sum nú fer til mjøl, sigur Robert Møller, sum er menningarstjóri hjá Royal Greenland.



## Nýggj hús í Mykinesi

Tað er ikki á hvørjum degi, at hús verða reist í Mykinesi, men tað hendi í gjár, tá nýggju húsini hjá tí 26 ára gamla Anton Joensen vórðu reist, skrivar joanisnielsen.fo. Stykkið varð grivið út í fjør og grundin stoypt. Í summar hava menn so smíðað húsini, og í gjár vórðu tey reist. Nýggju húsini standa í geilini oman fyri bygdina. Tann, sum seinast bygdi í Mykinesi, var Kjell Nattestad, sum eins og Anton Joensen er uppvaksin í Miðvági.



*Ein av teimum fimm prestununum, sum bjóðar seg fram at verða bispur, vil ikki víga kvinnuligar prestar, Bergur Debes Joensen sigur, sigur, at kvinnur hava rætt at verða prestur, men verður hann bispur, vil hann ikki víga ein kvinnuligan prest*

# Valevni til bisp vil ikki víga kvinnuligan prest

**Verður Bergur Debes Joensen okkara næsti bispur, fer hann ikki at viga kvinnuligar prestar. Hini fýra valevnini, sum bjóða seg fram at vera bispur, hava ongar trupulleikar við kvinnuligum prestum**

Verður Bergur Debes Joensen bispur, fer hann ikki at víga kvinnuligar prestar.

Tað ger hann greitt, nú sjálv atkvøðugreiðslan til bispastarvið er farin av bakkastokki.

Á fundinum í Leirvík í gjárkvøldið, var hann spurdur um hvørja støðu hann hevur til kvinnuligar prestar og um hann hevði vígt ein kvinnuligan prest.

Hóast hann var rættiliga tráðspurdur, vildi hann ikki koma við einum greiðum svari.

Hann sigur, at vit hava eina kirkjuskipan, sum er svarið til tann spurningin.

Eftir kirkjuskipanini hava kvinnur hava lógligan rætt at verða prestur og sum loyvir uppafturgiftum at verða prestur.

Tí hevði tað verið hansara ábyrgd at syrgt fyri, at ein kvinnuligur prestur og ein prestur, sum er uppafturgiftur, verður vígaður og innsettur sum prestur.

- Tað er mín ábyrgd og syrgi eg ikki fyri tí, bróti eg lógina, tí tað er ábyrgdin hjá bispi at syrgja fyri, at allir innstillaðir prestar fáa embæti, sigur Bergur Debes Joensen.

Men í viðmerking í blaðnum í dag, ger hann púra greitt, at verður hann bispur, hevði hann ikki sjálvur vígað ein kvinnuligan prest, men fingið onkran annan at gera tað.

- Tað avgerðandi er, at ein prestur verður vígaður og innsettur, tað er ikki avgerandi, hvør vígar og innsetur, sigur hann.

Bergur Debes Joensen leggur stóran dent á, at vit hava eina rúmliga kirkju og at kirkjan er rúmlig allar vegir og har tað, sum er loyvt eftir lógini, eisini er loyvt.

Tað merkir í hansara hugaheimi, at rúmd skal vera fyri øllum, bæði kvinnuligum og uppafturgiftum prestum og teimum, sum taka undir við tí. Men rúmd eigur sanniliga eisini at vera fyri teimum, sum eru ósamd í hesum.

Leggjast kann afturat, at hini fýra valevnini høvdu ongar trupulleikar havt av at víga ein kvinnuligan prest.

Men tey løgdu somuleiðis dent á, at tey tóku sanniliga undir við eini rúmligari kirkju.

Uni Næs helt harafturat, at har sum kvinnuligir prestar elvdi til trupulleikar, áttu vit at verið so mikið opin, at vit settu ein prest afturat, sum umboðaði eitt annað sjónarmið, so at kirkjuliðið fekk ein prest afturat fyri at sleppa undan at ósemjur syndraði kirkjuna.

Og skemtiliga íkastið til hetta kjakið átti sandoyarprestur, Jákup Reinert Hansen, sum endurgav danska yrkjaran, Benny Andersen, sum segði um kvinnur yvirhøvur, at “det er besværligt med - det er umuligt uden”.

## Prestar skulu vera trúgvandi

**Prestar, sum ikki eru trúgvandi, eiga ikki at fáa starv í føroysku fólkakirkjuni**

Prestarnir í føroysku fólkakirkjuni skulu verða trúgvandi.

Tað staðfesta øll tey fimm valevnini, sum stilla upp til biskupsval.

Á fundinum í Leirvík í gjárkvøldið vórðu tey fimm valevnini spurd ítøkiliga, hvat tey høvdu sagt, skuldi tað hent, at prestur søkir starv í føroysku fólkakirkjuni, sum sigur seg ikki trýr upp á kristnu læruna.

- Hevði prestur søkt um starv í føroysku fólkakirkjuni, sum ikki stendur innanfyri trúarjáttan fólkakirkjunnar, kemur hann ikki longur, gjørdi Jógvan Fríðrikson púra greitt.

Og tað taka øll hini valevnini undir við.

Jákup Reinert Hansen visti enntá á, at bispur hevur boðað prestum í hesari støðu, frá, at teir kunnu akkurát spara sær at søkja prestastarv í Føroyum.